

*Umleið hálvtannaðhundrað børn vóru til talvkapping á Giljanesi leygardagin*



*Tá ein sjálvur er liðugur við sítt talv, ber til at fylgja við, hvussu gongur hjá síðumanninum*

# Talvkapping á Giljanesi

## Barna- og ungdóms-talvkapping fyri lið !

**Kappingin á Giljanesi 1. mars 2003.**

Trý tey fremstu liðini í hvørjum bólki fingu heiðursmerki.

LUTTØKA:
22 LIÐ AV TEIMUM ELDRU.
14 LIÐ AV TEIMUM YNGRU. 10. MIN. Í PART
UMLEIÐ 160 TELVARAR ÍALT !

Tíð:
15 MIN. Í PART TIL TEIR ELDRU
10 MIN. Í PART TIL TEIR YNGRU

Eldri bólkur:
( 5. – 10. flokkur )
FINALUBÓLKUR:

| | | |
|---|---|---|
| NR. 1 | MT - 1: | Jón Gregersen<br>Ingi Joensen<br>Andras Ortind<br>Johan H. Ellefsen |
| NR. 2 | HT – 1 | Rógvi Mortensen<br>Helgi D. Ziska<br>Henry Berg<br>Fríðbjartur Debes<br>Margeir Berg |
| NR. 3 | GT – 1 | Andras Mikkelsen<br>Dia Guttesen<br>Óttar Olsen<br>Finnur Justinussen |
| NR. 4 | VT - 1 | |
| NR. 5 | KTF - 2 | |

Yngri bólkur.

( Til og við 4. flokk )
FINALUBÓLKUR

| | | |
|---|---|---|
| NR. 1 | HT – 4 | Hjalti Toftum<br>Heiðrikkur Jacobsen<br>Eli N. Leifsson<br>Árni K. Olsen<br>Olaf Samuelsen<br>Róar Dam |
| NR. 2 | VT – 3 | Rúni Vørmadal<br>Robert Andreasen<br>Johan Vørmadal<br>Jógvan Emil Joensen<br>Bárður Jónsson Stóra |
| NR. 3 | ST – 4 | Rógvi Egilstoft Nielsen<br>Poli Bernhardson<br>Brian Hansen<br>Sveinur Ellefsen |
| NR. 4 | RÓKUR – 4 | |
| NR. 5 | KT – 3 | |

**Seinasta vikuskiftið var stór talvkapping fyri børn og ung í Skúlanum á Giljanesi. Umleið hálvtannaðhundrað telvarar luttóku**

TALV
*Orð og myndir:*
*Edvard Joensen*

**Giljanesi:** Umleið hálvtannaðhundrað børn og ung í eini talvkapping, ger, at umhvørvið verður eitt sindur øðrvísið, enn tá átta vaksnir menn sita yvir av hvørjum øðrum og bína niður í borðið, meðan ein køvandi tøgn liggur yvir rúminum.

Tað ljóðar meira sum í einum fuglabergi enn til eina talvkapping, tá trinið verður inn í fimleikarhøllina á Giljanesi hendan leygardagin seinnapart.

Børn sita í longum røðum við borðini og telva. Summi eru øgiliga upptikin av talvinum, og taka tað heilt seriøst. Og onnur eru bara har, letur til.

Tað verður runnið og prátað, flutt og skrivað. Og rundan um alt ganga foreldrin og fylgja væl við alvanum og vaksa nakrar sentimetrar, hvørja ferð ein rættiliga intellegentur leikur verður fluttur røttu megin borðið.

Tað eru talvfeløgini í Vágum, Miðvágs- og Sandavágs Talvfeløg, sum skipa fyri hesi kappingini, sum er ein liður á veg móti einum Føroyameistaraheiti fyri lið. Hendan kapping er tann fyrsta av trimum. Onnur kappingin verður hildin á Oyrarbakka komandi vikuskifti.

Johannes Ellefsen frá Miðvágs Talvfelag, sigur, at í sonevnda dreingjabólkinum, sum tó eisini hevur gentur við í, eru 22 lið. Hetta er børn og ung úr fimta upp í 10. flokk. So eru eisini 14 lið við børnum yngri enn fimta flokk.

Telvað verður øll í móti øllum í hvørjum bólki, og hildið verður fram, hóast ein ikki sleppur víðari eftir fyrsta umfar. Tað vil siga, at tapararnir eisini sleppa at telva eitt umfar hvør móti øðrum. Og tað er ófført. Serliga hjá hesum smáu, sum á fyrsta sinni eru við í eini slíkari kapping. Ógvuliga glað, tí nú vóru tey komnir víðari, hóast tey høvdu tapt móti teimum, sum størri og royndari vóru.



*Teir spara ikki fólkið*



*Tað verður fylgt væl við og skrivað upp, hvat hendir*



*Allir sluppu at royna seg móti hvørjum øðrum*

# Bilar

Nr. 45 • hósdagur • 6. mars 2003 • 77. árg.




*Peugeot 807 bleiv valdur til ársins vørubil í Danmark 2003, saman við Fiat Ulysse og Citroën C8*

# Peugeot 807 Van – ársins vørubilur



*Her er Jan Hentze, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, við einum 807 við 2,2 litur dieselmotori við 130 hk.*



*Peugeot 807 innan. Instrumentborðið er av nýggja designinum við instrumentunum í miðjuni*




*Bilurin hevur stóra baklúku og el-skjótihurðar í síðunum.*

**Peugeot 806 verður nú avloystur av Peugeot 807. Bilurin er stórur og rúmligur við plássi til upp til átta ferðandi. Peugeot 807 verður gjørdur á somu fronsku bilverksmiðju sum Fiat Ulysse, Citroën C8 og Lancia Phedra.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hjá barnafamiljum ella hjá teimum sum hava brúk fyri nógvum plássi, er Peugeot 807 ein møguleiki til at ogna sær ein bil, sum kann brúkast til nógv ymisk endamál. Hóast bilurin líkist forgangaranum er talan um ein heilt nýggjan bil. Bilurin hevur fjarstýrdar el-skjótihurðar á báðum síðum. Hetta lættir munandi um teimum, sum skula inn og út úr bilinum. Peugeot 807 fæst bæði sum MPV við upp til átta sitiplássum og sum vørubilur. Setrini kunnu flytast, snarast ella takast út, alt eftir hvat bilurin skal búkast til. Av tí at hondbremsan situr vinstru megin førarasetrið, og girstongin er í instrumentborðinum, er gott pláss at ganga millum setrini. Instrumentborðið er av nýggja designinum við instrumentunum í miðuni.

### Tríggir motorar

Peugeot 807 fæst við trimum ymiskum motorum, einum 2,0 bensinmotori við 138 hk, og tveimum HDI dieselmotorum við ávikavist 110 og 130 hk.

Viðvíkjandi trygdini hevur Peugeot 807 airbag framman, í síðunum og gardinairbag.

Umframt ABS, hevur bilurin eisini EBA (Emergency Brake Assistent) EDB (Elektroniskan bremsukraftdeilara) ESP (Elektroniskt Stabilitets Program), automatisk katastrofublunkljós við neyðuppbremsing. Peugeot 807 hevur eyðkendar franskar koyrieginleikar við eini servostýring, ið tillagar seg ferðina. Umframt alla standardútgerðina fæst 807 við hesi eykaútgerð: Klimakontroll, sóltaki (3 sóltak), parkeringsradara, el-skjótihurðum, leður setrum, Xenon forlyktum og 15" alufelgum. Saman við Citroën C8 og Fiat Ulysse bleiv Peugeot 807 kosin til "Årets Varebil i Danmark 2003". Fjórði bilurin í familjuni, Lancia Phedra, var ikki við av tí orsøk at hann verður ikki innfluttur til Danmarkar. Teir vunnu t.d. uppá at teir hava skjótihurðar í báðum síðum, stóra baklúku, stórt og rúmligt vørurúm ið er gott at koma til, rattið kann stillast allar vegir og teir eru góðir at koyra, eisini fult lastaðir.

## Peugeot 807 2,2 HDi Van

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,2 litur 4 syl. diesel við 130 hk<br>v. common-rail innspræning |
| 0-100 km/t: | 13, 6 sek |
| Oljunýtsla: | 13,5 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd: | 215/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 472,7 cm |
| Breidd | 185,4 cm |
| Hædd | 175,2 cm |
| Eginvekt | 1725 kg |
| Totalvekt | 2500 kg |
| Vørurúm | 2948 litrar |
| Prísur | kr. 299.000 |
| + el-dragihurðar | kr. 5.500 |
| + leður setur | kr. 11.600 |
| Søluumboð: | P/F Meinhardt Arge<br>Undir Krákugjógv 5<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>e-mail: peugeot@bilarge.fo |